

# MEST ger dokkina á Skála klára til skip við serkrøvum

**Jan Müller**

15.09.2015 - 15:00

Oljan.fo

Arbeitt verður í hesum døgum við at fáa gjørt ein nýggjan brunn í dokkina á Skála eins og at nýtt tak verður lagt á smiðjubygningin.

Ein nýggjur brunnur á 20 fermetrar og 4 metra dýbd verður í hesum døgum gjørdur á skipasmiðjuni á Skála. Íløgan verður framd fyri millum annað fyri at gera turrdokkina meiri áhugaverda fyri veitingarskip innan frálandsvinnuna.

Flestu av veitingarskipunum innan frálandsvinnuna hava eina Azimut skrúvu framman, sum kann lorast undan botninum niður í brunnin í sambandi við kanningar og sýn. Tessvegna er neyðugt at hava ein brunn, har tað er møguligt at koma fram at í samband við umvælingararbeiði.

“Í okkara samrøðum við mong reiðarí innan frálandsvinnuna hava fleiri av teimum nevnt tørvin á einum brunni. Tessvegna gera vit nú íløgur á Skála fyri. at vit eisini kunna taka serútgjørd skip upp á dokkina”, sigur Mouritz Mohr, stjóri.

Samstundis verður nýtt tak lagt á smiðjubygningin á Skála. Tað er P/F Búsetur, sum stendur fyri allari byggingi. Arbeiðið er væntandi liðugt um miðjan oktober í ár sigur MEST frá í tíðindaskrivi.


